SKRÁIN FYRI

# BÁTAFESTIVALIN Á TOFTUM

LEYGARDAGIN 2. MAI 2026









Hallur Joensen Band



Lív Næs & Tróndur Enni



Jón Eliassen



Bjarki Hansen

| | |
|---|---|
| KL 11:00 | BÁTARNIR MØTAST INNI Í SKÁLAFIRÐI |
| KL 11:30 | SIGLA Í MÓTI TOFTUM |
| KL 12:30 | NES SÓKNAR HORNORKESTUR BYRJAR AT SPÆLA VIÐ BÁTAHYLIN Í OYRUNUM |
| KL 13:00 | BÁTARNIR KOMA Í OYRARNAR Á TOFTUM |
| KL 13:00 | ANDLITSMÁLING KL 13.00 KAFFISØLA OG TOMBOLA í FESTIVALTELTINUM – KVINNUFELAGIÐ OG TOFTA TALVFELAG SKIPA FYRI BÁÐUM TILTØKUNUM |
| KL 13:30 | JENS JACOB OLSEN HELDUR VÆLKOMURØÐU Í TELTINUM |
| KL 13:30 | HOPPIBORGIR V.M. Á FESTIVALØKINUM |
| KL 13.30 - 14.45 | SUPPA TIL ØLL Í TELTINUM |
| KL 13.30 | HARMONIKURNAR BYRJA AT SPÆLA Í TELTINUM |
| KL 14:00 | PYLSUVOGNURIN LETUR UPP Á FESTIVALØKINUM |
| KL 14:30 | SKATTAVEIÐA FYRI BØRN |
| KL 15:00 | SØLAN AV TEIMUM VÆL UMTÓKTU FESTIVALBÚFFUNUM BYRJAR |
| KL 15:00 | JÓN ELIASSEN SYNGUR Í TELTINUM |
| KL 15:45 | 2SOME SYNGJA Í TELTINUM |
| KL 16:45 | BJARKI HANSEN SYNGUR Í TELTINUM |
| KL 17:30 | JÓHANNA SÁMALSDÓTTIR SYNGUR Í TELTINUM |
| KL 18.15 | 😊 SYNGUR Í TELTINUM |
| KL 19:00 | LÍV NÆS & TRÓNDUR ENNI SYNGJA Í TELTINUM |
| KL 20:00 - KL 21.30 | SYNGIÐ VIÐ TILTAK VIÐ FUGLAFJARÐAR HARMONIKUFELAG |
| KL 23:00 - KL 04.00 | DANSUR VIÐ HALLUR JOENSEN BAND |

Kl. 17:15 Betrideildardystur á Svangaskarði: B68 vs EB/Streymur

kodio / Føroyaprent / 500 eintøk

# VÁRDAGAR

25. APRÍL – 2. MAI 2026

SKRÁ









## BÁTAFESTIVALUR Á TOFTUM

LEYGARDAGIN 2. MAI 2026

NES KOMMUNA

Ein kommuna fyri øll

VÁRDAGAR

25. APRÍL – 2. MAI 2026

SKRÁ



## LEYGARDAGUR 25. APRÍL

Ruddingardagur

Kl. 09.00 Morgunmatur í forhøllini í Tofta skúla, har posar verða at fáa.
Kl. 09.15 Framførsla við "Nøtte" frá Nes Sóknar Musikkskúla.
Kl. 10.00 Farið verður at rudda.
Kl. 12.00 Hugnaløta á havnalagnum. Borgarar fáa handað trø.
Grillaðir búffar verða til matna og Jóhanna Sámalsdóttir syngur.
Kl. 12.00 - 18.00 Almenn svimjing. Heitur hylur. Ókeypis.
Kl. 19.00 Basarur og tombola á Svangaskarði. B68 skipar fyri.

## SUNNUDAG 26. APRÍL

Kl. 18.00 Várkonsert í Fríðrikskirkjuni v/Kirkjukórinum, Sandoyarkórinum og Kristiliga Sangkórinum.

## MÁNADAGUR 27. APRÍL

Kl. 17.15-19.15 Sharon Sivertsen skipar fyri dansi/spølum fyri børn á Svangaskarði.
Kl. 17.15 fyri børn frá 5 til 8 ár. Kl. 18.15 fyri børn 9 til 12 ár.
Kommunan bjóðar suppu frá kl. 17.00 og úteftir. Tiltakið er ókeypis.
Kl. 18.00 - 20.00 Almenn svimjing. Ókeypis.
Kl. 19.00 - 21.00 Plantu- og kompostverkstova v/Aneliu Philbrow á Bókasavninum í Tofta skúla. Pláss er fyri umleið 12 luttakarum.
Tilmelding hjá Aneliu Philbrow tlf. 506621. Tiltakið er ókeypis.
Eisini byrjar teknikapping fyri børn. Evnið er náttúra og umhvørvi.
Bókasavnið fer á Várdøgunum at fagna nýføroyingum í kommununi.
Í ár fer Nepal at seta dám á bókasavnið.

Kl. 20.00 - 21.30 Í Undirhúsinum fer Silas Olofson at greiða frá og sýna fram áhugaverdar myndir um fuglar. Vit fylgja fuglum á teirra leið til búpláss. Dentur verður lagdur á fuglalívið í Nes kommunu. Ein góður drekkamuður verður at fáa.

## TÝSDAGUR 28. APRÍL

Kl. 17.30 Hugnaløta á Neshamri við Kristu og Sámal Hanna Lognberg.
Aftaná verður boðið til nátturða í kjallaranum í Fríðrikskirkjuni.
Kl. 19.00 - 21.00 Perluverkstova á Bókasavninum við Monu og Heidi.
Tilmelding hjá Monu tlf. 229828. Tiltakið er ókeypis.
Kl. 19.00 - 22.00 Mannfólkakvøld á Svangaskarði.
- Signar í Homrum syngur nakrar sangir.
- Gunnar Hjelm: "Viljin er lekjandi máttur».
- Jógvan M. Olsen: «Meira enn fótbóltur»: at vera partur av hesari ferð, tá ið B68 vann trý meistaraheitir – og øll bygdin stóð aftanfyri.
- Henning hevur quiz.
Døgurði, drekkamuður og ís/pannukøkur.
Kostnaður 250 kr, skal gjaldast við dyrnar.
Tilmelding á tlf. 255959. Tilmeldingarfreist er 27. apríl. kl. 18:00.

## MIKUDAGUR 29. APRÍL

Kl. 13.00 Gongutúrur við Janusi Jensen sum frásøgumanni.
Møta á Líðarenda úti á Nesi.
Ganga eftir nýggju gøtuni niðan til Kornvatn. Síðan verður gingið norður eftir Homrunum, eftir Húkslondum og inn á Svangaskarð, har ein drekkamuður verður at fáa.
Kl. 16.00 - 18.00 Almenn svimjing. Heitur hylur. Ókeypis.
Kl. 17.30 Skrúvugudstænasta í Fríðrikskirkjuni við Tummasi Kannuberg, presti.
Kl. 17.00 - 19.00 Bókasavnið í Tofta skúla er opið.
Kl. 20.00 Kvinnukvøld í Tofta skúla.
Skrá:
Skemt v/Elisu Vang.
Sangframførsla v/Mariu R. á Heygum.
Navia hevur mótasýning.
Ein góður drekkamuður verður at fáa.
Tiltakið kostar kr. 150, og goldið verður við dyrnar.
Eftir tiltakið er opið í Navia.

## HÓSDAGUR 30. APRÍL

Kl. 10.00 Útferð í Vágarnar: Morgunkafein í Tabor og Nes kommunu skipa fyri. Farið verður við bussi av havnalagnum á Toftum kl. 10.00. Koyrt verður til Sandavágs. Vitjað verður í kirkjuni, har andakt verður, og Heini F. Petersen greiðir frá. Síðan verður vitjað í Messuni í Sørvági, har frágreiðing verður givin og døgurði verður at fáa.
Neyðugt verður at tekna seg til túrin í seinasta lagi mánadagin 27. apríl kl. 12.00 á tlf. 225836 (Marjan Nielsen) ella 447586 (Nes Kommuna).
Tiltakið er ókeypis.
Kl. 16.30 Familjutiltak á Svangaskarði. B68 skipar fyri. Spøl, undirhald og matur.
Tiltakið er ókeypis.
Kl. 18.00 Jóhanna Petersen skipar fyri linedansi í Tofta skúla. Ein drekkamuður verður at fáa.
Kl. 17.00 - 20.00 Almenn svimjing. Ókeypis.
Kl. 19.00 Bindiskeið í Navia við Sáru Mrdalo. Ein drekkamuður verður at fáa. Eisini verður høvi at síggja framleiðsluna og forvitnisligu bindimaskinurnar í kjallaranum.
Kl. 19.30 - 21.00 Sjónleikur verður framførdur í forhøllini í Tofta skúla. Bókasavnið skipar fyri.
"Upphav" eftir Gunnvá Zachariassen og Maritu S. Dalsgaard, er leikur um skaðadagin í Hesti í 1919, tá ið tveir bátar gingu burtur og ellivu menn sjólótust. Hestoyggin misti helmingin av monnum sínum í arbeiðsførum aldri. Hetta er dømi um ein av mongu sorgardøgunum hjá eini tjóð, sum hevur livað av og við havinum.
Menninir í Undirhúsinum syngja.
Tiltakið er ókeypis, og bjóðað verður til kaffi og kaku.

## FRÍGGJADAGUR 01. MAI

Kl. 20.00 Fagranes skipar fyri «Syngið við løtu» og andakt í tjaldinum.
Sangluttøka við: Eyðun Jacobsen, Terja Vestergard, Torbjørn Láadal og Kristu og Sámal Hanna Lognberg.
Drekkamuður verður at fáa, og kl. 23 verður suppa bjóðað.